

# Tríggir ungir menn burturblivnir í Grønlandi

## Leiting var í vikuskiftinum sett í á sjónum sunnan fyri Uummannaq í Grønlandi

Kristian Dahl, løgreglumaður, skrivar úr Nuuk

Leygarmorgunin komu fólk fram á ein opnan bát, sum mannleysur sigldi í ring út fyri bygdini Ikerasik. Bygdin er stutt frá Uummannaq, sum er norðan fyri Diskovíkina í Vesturgrønlandi.

Tríggir menn, 17, 18 og 27 ára gamlir, vóru farnir út við lítla bátinum. Tá báturin varð funnin, var einki at síggja til hesar tríggjar ungu menninar, og eru teir uttan iva onkursvegna dotnir úr bátinum.

Stór leiting var beinanvegin sett í verk. Tyrla frá AirGreenland leitaði í økinum allan dagin, umframt at bátar sigldu í økinum, har báturin var funnin. Verjuskipið Knud Rasmussen var statt nakað langt burtur, men setti beinanvegin kós móti økinum.

Einki hevur verið at sæð til teir burturblivnu. Onkur pløgg vóru tó funnin, sum eru eyðmerkt sum pløgg hjá teimum burturblivnu.

Leitingin helt fram sunnudagin, men sannlíkindini fyri at finna menninar á lívi eru ikki góð.

### Ikki eindømi

Seinast í apríl mánaði kravdi líknandi hending tvey mannalív í Grønlandi. Tveir menn, 27 og 56 ára gamlir, sjólótust sunnan fyri Pamiut í Suðurgrønlandi. Bátur teirra var funnin mannleysur í sjóøkinum við bygdina Arsuk. Í teirri leitingini eydnaðist at finna líkið av øðrum manninum, meðan líkið av hinum manninum ikki var funnið.

Nógvar druknivanlukkur eru tíverri í Grønlandi á hvørjum ári. Grønlendingar gera ikki nógv við at brúka bjargingarútgerð á bátum sínum. Harafturat eru bátarnir ofta smáir og hava ógvuliga stórar motorar ísettar. Hetta ger, at ferðin á bátunum er rættiliga stór. Skjótt kann enda galið, tí vandin er stórur fyri at sigla m.a. á íspettir, sum liggja í sjónum.

# Tey veikastu betur vard

**VERJUMÁLSLÓGIN** Nýggja lógin ger tað óneyðugt at ómynduggera dement og menningartarnað fólk. Upplýsandi fundur um nýggju lógarbroytingina verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni hóskvøldið klokkan 19.30

Randi Jacobsen

1. mai kom verjumálslógin í gildi í Føroyum og hetta er eitt stórt framstig fyri tey fólk, sum eru so mikið veik, at tey higartil hava verið ómynduggjørd.

Eftir nýggju logini skal í hvørjum einstøkum føri gerast ein ítøkilig meting av, hvussu stóran týdning tað hevur fyri viðkomandi at fáa verja, og hvussu umfatandi verjumálið skal vera. Verjumálið má ongantíð vera meira umfatandi enn neyðugt.

Tey, sum eru ómynduggjørd, kunnu fáa broytt umfangið av verandi verjumáli, sigur Lene Moyell Joahnsen, fulltrúi hjá Ríkisumboðnum.

Øll, sum eru undir 18 ár og ikki eru gift, eru undir verjumáli. Tey eru ómyndug. Hetta merkir, at tey ikki kunnu gera bindandi avtalur um keyp og sølu, og tey kunnu ikki ráða yvir ognum sínum. Hava tey gjørt ein handil, kann handilin ganga aftur, tí keyparin hevur skyldu til at kanna, um keyparin er undir verjumáli.

Verjumál kunnu gerast fyri fólk yvir 18 ár, sum ikki eru før fyri at taka sær av sær sjálvum og umsita pening.

### Verjin hjálpir

Eitt verjumál merkir, at persónurin fær ein verja, sum tekur avgerðir vegna persónin í teimum málum, sum verjumálið umfatar.

Í flestu førum er persónurin framvegis myndugur og ræður sær. Hann hevur eisini framvegis valrætt.

Skyldfólk, eitt nú systkin, kunnu vera verjar, men tá ið tað kemur til arv og onnur fíggjarlig mál, verður eitt óheft fólk sett til verja í tí málinum.

Nógvar aðrar broytingar eru í nýggju lógini, sum Ríkisumboðið í hesi vikuni fer at kunna nærri um. Ríkisumboðið sær tað sum sína skyldu at kunna um broytingarnar.

Tey fara at hava fund við skiftirættin, advokatar, røktarheimsfólk, Innlendismálaráðið, læknar, sjúkrahúsfólk, við verjar, politiið, kommunur, feløg, bankar og tryggingar.

Hóskvøldið kl. 19.30 verður almennur fundur í Miðlahúsinum um verjumálslógina.

Lene Moyell Johansen heldur tað vera eitt stórt framstig, at verjumálslógin er komin og avloysir gomlu lógina frá 1922 um ómynduggering.

– Nógv fólk hava brúk fyri at hava verja, men tey og teirra avvarðandi hava hildið seg aftur av ótta fyri ómynduggering. Nú er ikki neyðugt at ómynduggera eitt fólk, sum ikki er dement ella menningartarnað, soleiðis sum tað var frammanundan eitt nú í samband við arv ella annað, sum kravdi teirra undirskrift, sigur Lene Moyell Johansen.



*Hóskvøldið klokkan 19.30 verður almennur kunnandi fundur í Miðlahúsinum um verjumálslógina. Tá fara Lene Moyell Johansen, fulltrúi hjá Ríkisumboðnum og Arne Madsen frá ríkisfyrisitingini at lýsa broytingar, sum eru komnar við nýggju lógini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Neyðtøkuroynd í Havn

Randi Jacobsen

Sunnumorgunin umleið klokkan 4.30 fór ein 26 ára gomlu kvinna heim úr býnum.

Hon skuldi yvir í Eysturbýin og fekk eftir M. A. Winthersgøtu, fór yvir um Jónas Broncksgøtu og parkeringsplássuið á Frúutrøð og skákaði so yvir í Lon.

Hon varnaðist, at ein ungur maður elti hana, men hon gekk kortini róliga.

Tá ið ho var komin yvir í Lon, leyp tann ungi maðurin á hana og royndi at skræða klæðini av henni.

Kvinnan bardist ímóti og rópti eisini um hjálp.

Tá misti tann ungi maðurin móti og flýddi.

Kriminalpolitiið hevur tosað við fleiri fólk í grannalagnum. Summi hava hoyrt neyðarrópið, men eingin teirra hevur sæð nakað.

Tað kann vera, at onkur hevur sæð ta 26 ára gomlu kvinnuna, sum varð elt av einum eitt sindur yngri manni, og kriminalpoliitið heitir á møgulig vitni um at hjálpa við upplýsingum.

Tann ungi maðurin er mettur at vera 20-23 ára gamal, 170-175 cm høgur og vanliga bygdur. Hann hevði myrkt stutt hár, var í graári hettutroyggju, cowboybuksum og í myrkum kondiskóm.